**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1838**
**Tíðarskeið 29/8-4/9-2018**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Hjálmar Hátún og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðum. Eisini skuldu vit royna at lesa data úr tveimum hitamátarum, sum liggja á botni norðanfyri og vestanfyri. Vit skuldu eisini royna at fáa ein streymmátara upp úr Bankarennuni, sum ikki kom upp í summar.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur og útgerð at lesa hitamátara akustiskt.
Útgerð at fáa streymmátara upp við.

**Um túrin:** Vit loystu mikudagin 29/8 kl. 18.
Siglt varð eystur á støð N1. Skurður N varð tikin norðureftir. Tá liðugt var á N14, varð siglt suður á skurð E, sum varð tikin móti Hetlandi. Haðani sigldu vit suður á skurð S, sum vit tóku frá markinum og inn á Munkagrunnin. Haðani varð siglt á skurð V, sum varð tikin av Landgrunninum og út á Føroyabanka. Tá hesin skurður var tikin, varð siglt mitt út í Bankarennuna har streymmátararnir liggja. Fyrst tóku vit eina CTD støð yvir streymmátara á NWFB. So var farið til NWFC, har vit royndu at fáa streymmátarin NWFC upp, tað lukkaðist. Haðani varð siglt norður á skurð K, sum vit tóku inn móti Koltri.

Vit vóru á Havnini aftur 4/9 kl. 00:25.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 75 støðir. WP2-glúp á 42 støðum.
Á støðunum V6, N14, N13, N5, N4, S8 og á støðunum K11-K8, vóru prøvar tiknir av tøðsøltum.
Á støðunum V6, N14 og N5, vóru prøvar tiknir til $CO_2$ kanningar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst.

**Viðmerkingar:** Á positiónunum 61°30,0N 7°34,9V og 62°39,9N 6°04,96V lósu vit data úr tveimum hitamátarum, sum liggja á botni. Tað gekk væl at lesa data og tók tað minni enn hálvan tíma frá tí at vit løgdu stilt, til vit sigldu aftur.

5-9-2018

Regin Kristiansen

Vend




Støðir á túri 1838